## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin minni vindur og regn av og á. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig, men um kvøldið niður í 2 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot till andøvsgul av útnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís vátaslettingur. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís vátaslettingur. Hitin millum 2 og 6 stig.

# Fiskur fær strongd av oljuleiting

**Seinasta summar gjørdi eitt skip seismiskar kanningar á leiðunum úti fyri Lofoten og Vesterålen í Noregi. Samstundis kannaði havrannsóknarstovnurin, hvussu tann seismiska skjótingin ávirkaði fiskin á leiðunum, og kanningarúrslitið, sum nú er kunngjørt, vísir, at tann seismiska skjótingin strongdi fiskin**

OLJA OG FISKUR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*



*Royndir vórðu gjørdar við ymsum reiðskapi nærhendis seismiska royndarskipinum Geo Pacific úti fyri Lofoten og Vesterålen seinasta summar*

*Mynd: Scanpix*

Tað var norska oljumálaráðið, sum bað havrannsóknarstovnin kanna, um tær seismisku kanningarnar úti fyri Lofoten og Vesterålen høvdu nakra ávirkan á fiskin har. Úrslitið skulu politikararnir brúka, tá teir seinni skulu taka støðu til, um teir skulu loyva oljuvirksemi á teimum báðum leiðunum, sum eru týðandi fiskileiðir. Úrslitið skal eisini brúkast, tá Stórtingið seinni í ár skal taka støðu til eina komandi oljuvinnu í Barentshavinum.

Ole Arve Misund, sum stóð fyri kanningunum hjá havrannsóknarstovninum, sigur við Aftenposten, at tað var týðiligt, at fiskurin varnaðist ljóðið frá teimum seismisku kanónunum. Men tað var ymiskt, hvussu tey einstøku fiskasløgini vórðu ávirkað við tí úrsliti, at tað var meiri at fáa av summum sløgum og minni av øðrum.

Ole Arve Misund sigur, at samanumtikið hevði tann seismiska skjótingin ikki serliga stóran ávirkan á fiskin, og hon hevði eisini lítla ávirkan á fiskiskapin, sigur hann.

### Ymiska ávirkan

Kanningarnar hjá havrannsóknarstovninum vístu, at bátar, sum royndu við gørnum eftir svartkalva og kongafiski, fingu meiri aftan á tær seismisku kanningarnar enn frammanundan. Bátar, sum royndu við línu eftir svartkalva, fingu minni, meðan tær seismisku kanningarnar vóru, men fiskiskapurin batnaði aftur aftaná. Bátar, sum royndu við línu eftir hýsu, fingu minni á, tá seismikkskipið nærkaðist línuni. Tá skipið var næst línuni, var tað minni enn ein fjórðing frá.

-Tann mest sannlíka frágreiðingin um broytingarnar í fiskiskapinum er, at fiskurin verður strongdur av ljóðbylgjunum frá teimum seismisku kanónunum. Tað ger, at fiskurin svimur meiri enn vanligt, og tað sigur, hví bátar við gørnum fingu meiri svartkalva, samstundis sum bátar, ið fiskaðu svartkalva við línu, fingu minni, skrivar havrannsóknarstovnurin í frágreiðingini.

### Heitt evni

Tann nýggja kanningin gevur ikki tað sama úrslitið sum eldri kanningar, sum vístu, at bæði línubátar og trolarar fingu minni, tá kanningarskip skutu seismikk. Frágreiðingin hjá norska havrannsóknarstovninum er, at í teimum eldru kanningunum var tann seismiska skjótingin miðsavnað um eitt avmarkað øki, og tí var fiskurin meiri ávirkaður tá enn í kanningunum úti fyri Lofoten og Vesterålen, har kanningarøkið var størri.

Aftenposten skrivar, at kanningarúrslitið hjá havrannsóknarstovninum verður eitt týðandi skjal í viðgerðini, tá Stórtingið seinni í ár fer at umrøða, hvussu tilfeingið í Barentshavinum skal umsitast. Tá skulu politikararnir taka støðu til, hvussu umfatandi oljuvirksemið í Barentshavinum skal verða.

Upp undir seinasta stórtingsval var júst hetta evnið eitt av teimum heitu málunum, og allir flokkar uttan Arbeiðaraflokkurin hava tikið greiða støðu fyri ella ímóti. Stjórnarflokkurin hevur sagt, at hann fer at taka støðu undir viðgerðini.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -12 |
| Nuuk | -9 |
| Qaqortoq | -6 |
| Ammassalik | -6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 6 |
| Tromsø | -1 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | -6 |
| Stokkhólm | -1 |
| Keypmannah. | -1 |
| Helsinki | -9 |
| Moskva | -4 |
| Berlin | -1 |
| Warzawa | -1 |
| Kiev | -2 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 18 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 36 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 6 |
| Miami | 13 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1034 hPa. yvir Skotlandi stendur mestsum í stað. Eitt lágtrýst, 1010 hPa. við Jan Mayen fer eystureftir og dýpist.

**Komandi nátt:**
Hátrýstið við Skotland stendur mestsum í stað og viknar nakað. Brúgvalagið sunnan fyri Ísland kemur hendavegin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 05/03 kl. 06$^{00}$ – 06/03 06$^{00}$. Hitin í gjár: 4,3°
Minsti hiti máldur í mars: -11,0° -
Mesti hiti máldur í mars: +11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 05/03 kl. 06$^{00}$ – 06/03 06$^{00}$.
Avfallið higartil í mars: 10 mm




javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

7. mars — Seinna kvarter
12. mars — Mánin longst frá jørðini
15. mars — Tendring

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. mars | 02:07 | 14:32 | 01:07 | 13:32 | 01:22 | 13:47 | 04:07 | 16:32 | 05:07 | 17:32 | 00:22 | 12:47 | 11:47 | - | 02:22 | 14:47 | 03:22 | 15:47 | 01:52 | 14:17 | 03:07 | 15:32 |
| 10. mar. | 02:55 | 15:18 | 01:55 | 14:18 | 02:10 | 14:33 | 04:55 | 17:18 | 05:55 | 18:18 | 01:10 | 13:33 | 00:10 | 12:33 | 03:10 | 15:33 | 04:10 | 16:33 | 02:40 | 15:03 | 03:55 | 16:18 |
| 11. mar. | 03:40 | 16:02 | 02:40 | 15:02 | 02:55 | 15:17 | 05:40 | 18:02 | 06:40 | 19:02 | 01:55 | 14:17 | 00:55 | 13:17 | 03:55 | 16:17 | 04:55 | 17:17 | 03:25 | 15:47 | 04:40 | 17:02 |
| 12. mar. | 04:22 | 16:42 | 03:22 | 15:42 | 03:37 | 15:57 | 06:22 | 18:42 | 07:22 | 19:42 | 02:37 | 14:57 | 01:37 | 13:57 | 04:37 | 16:57 | 05:37 | 17:57 | 04:07 | 16:27 | 05:22 | 17:42 |
| 13. mars | 05:00 | 17:18 | 04:00 | 16:18 | 04:15 | 16:33 | 07:00 | 19:18 | 08:00 | 20:18 | 03:15 | 15:33 | 02:15 | 14:33 | 05:15 | 17:33 | 06:15 | 18:33 | 04:45 | 17:03 | 06:00 | 18:18 |